LM-088/2023

Fylgiskjal 16.

Gunnvá Ellendersen

Fra: Javni <javni@javni.fo>
Sendt: 5. februar 2024 23:30
Til: Løgmálaráðið
Emne: Mál nr. 23/09500-48

Javni takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskotið um løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin). Vit taka undir við, at verandi lóg er gomul og ótíðarhóskandi, og má tillagast nútíðar viðurskifti.

Vit vilja gera vart við, at Føroyar hava tikið undir við sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi einstaklinga, ið bera brek. Grein 10 í hesum sáttmála hevur yvirskriftina *Rættur til lív* og sigur, at *Limalondini vátta, at eitt og hvørt menniskja hevur natúrligan rætt til lív og vilja taka øll neyðug stig til at tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa notið henda rætt til fulnar á jøvnum føti við onnur.*

Lógaruppskotið kemur inn á fleiri viðurskifti, sum fyri Javna eru sera viðkomandi og viðkvom. Til dømis verður mismunur gjørdur á heimildunum, tá mistanki er um brek, og tað ber til at fáa fosturtøku framda eftir 12. viku.

Í §3, stykkið 3, stendur, at *ein kvinna, sum býr í Føroyum, kann fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku.*

Umframt at gera mun á fostrunum í móðurlívið, so letur hesin paragraffur upp fyri fleiri spurningum. Hvør ella hvat skal avgerða, nær vandin er stórur, og hvat er álvarsligt brek? Og fyri hvønn skal brekið ella sjúkan vera álvarslig – mammuna? Barnið? Samfelagið? Er Down Syndrom til dømis álvarsligt nokk? Ella hvussu við at mangla eitt bein ella ein arm? Skulu vit hava ein lista yvir brek, ið verða mett sum álvarslig? Javni umboðar fleiri føroyingar, ið liva við avbjóðingum av ymiskum slagi, men hóast tað hava eitt gott og ríkt lív. Bæði fólk, ið sjálvi bera brek, og teirra avvarðandi.

Í sama paragraffi, stykkið 4, stendur víðari at ein kvinna, sum býr í Føroyum, kann fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um *kvinnan orsakað av likamligari ella sálarligari sjúku ella sálarligum menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt, ella viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum má metast at vera ein so álvarslig byrða fyri kvinnuna, sum ikki kann sleppast undan á annan hátt enn við fosturtøku, og at tað fyri kvinnuna, fyri at halda uppi húsi og heimi hennara ella av umsorgan fyri øðrum børnum í familjuni má metast at vera neyðugt, at viðgongutíðin verður avbrotin.*

Um eitt brek verður mett at verða álvarsligt, ella um ein kvinna ikki megnar eina íkomna støðu, kann rættiliga lætt tengjast at tí hjálp, ið kvinnan, familjan ella barnið fær bjóða. Tí kann sosialpolitikkur verða við til at mynda hetta. Um eingin ella ov lítil hjálp er at fáa til barnið ella mammuna er meira sannlíkt, at støðan kemur undir at vera álvarslig. Útlit til manglandi møguleikar fyri hjálp, um barnið væntast at bera brek, má ongantíð verða orsøkin til, at ein kvinna velur fosturtøku.

Lógaruppskotið leggur upp til, at ein kvinna skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Um útlit eru til, at barnið ber brek, eigur tilboðið um ráðgeving eftir okkara tykki at vera útvíðka, og mamman má fáa neyva kunning um, hvør hjálp er at fáa eftir barnsburð. Slík kunning og upplýsing eigur ikki at bert at verða læknalig, men verða so breið og saklig sum til ber. Vit vita um dømi úr Danmark, har ráðgevingin hevur verið sera einsíðis frá sjúkrahúsverkinum, og har skipanin næstan sum ein sjálvfylgja hevur lagt upp til, at um barnið bar brek, so skuldi viðgongutíðin steðgast.

Vit ynskja Løgtinginum blíðan byr við lógarsmíðnum, og enda við aðalreglunum, sum eru ásettar í stovningarskjali Sameindu Tjóða, sum viðurkenna, at øll menniskju hava virðing og tign íborna, og at hvørt mansbarn eigur somu ómissandi rættindi, og at tær eru grundarlagið undir frælsi, rættvísi og friði í heiminum.

Vinarliga vegna Javna

Fía Petersen
Forkvinna
fia@javni.fo

javni

Hoydalsvegur 42
Postrúm 1133
FO 110 Tórshavn
Tel. +298 208090
www.javni.fo